# Ikki bara fótbóltur

**Hóast Klaksvíkar Kommuna er ein aktivur partur av KÍ-loysnini, so leggur borgarstjórin dent á, at tað eisini framyvir verður rúm fyri øðrum og meira enn fótbólti í kommununi**

KLAKSVÍK
*Jákup Mørk*

Hóast næst størsta kommunan í landinum leingi hevur verið ein aktivur partur í royndunum at loysa fíggjartrupulleikarnar hjá KÍ, so eru tað tó langt ífrá øll, sum hava verið so øgiliga væl nøgd um hetta. Ikki minst, tí óttin hevur verið fyri, at ein øktur kommunalur innsatsur í KÍ fer at hava við sær, at aðrar ítróttargreinar fara at verða við sviðið soð fíggjarliga.

### Skottið er týdningarmikið

Steinbjørn O. Jacobsen, borgarstjóri, staðfestir eisini, at hann hevur verið varugur við hendan óttan og vandan, men tá vit týskvøldið tosaðu við hann, staðfesti hann, at júst hendan loysnin er nærum tann optimala í so máta.

- Hetta hevur verið eitt evni, sum hevur fingið stóra umrøðu. Eisini í býráðnum. Tann loysnin, sum nú er funnin, liggur eisini innan fyri teir fíggjarkarmar, sum vit hava sett í fíggjarætlanini fyri inniverandi ár, og tí er eingin trupulleiki í so máta.

- Hartil, so er hetta eisini ein loysn, sum eg eri sera væl nøgdur við. Fyrst og fremst, so ynsktu vit í býráðnum, at skuldu vit umvegis KÍ-høllina verða ein partur av loysnini, so vildu vit hava eitt skott millum KÍ og høllina. Tað skottið hava vit fingið.

- Og tað er eisini komið, uttan at vit hava verið noydd at yvirtaka høllina, soleiðis sum tað onkra tíð hevur verið róð framundir. Sæð yvir eitt longri áramál, so merkir tað kanska tað sama, um vit høvdu keypt høllina, ella um vit hækka nýtslugjaldið, men tað tyngir ikki gjaldførið í nær námind eins nógv, nú hendan loysnin er vald. Og tað tekur heldur einki av íløgujáttinini, soleiðis sum tað annars vildi gjørt.

Tað hevur verið nevnt, at aðrar ítróttargreinar kanska koma at merkja sviðan av, at KÍ nú óbeinleiðis fær fleiri kommunalar pengar. Er tann óttin grundaður?

- Nei. Tvørturímóti. Tað er ein onnur høll ávegis í kommuni (Badmintonhøllin, blðm.), og her hava vit í prinsippinum játtað at stuðla við 4,5 mió kr. Og vit hava so ongar sum helst ætlanir um at skerja upphæddirnar til hini feløgini. At fokus á KÍ er stórt, kemst einamest av, hvussu nógv felagið fyllir í samfelagnum her norðuri. Men vit hava á ongan hátt gloymt hini, staðfestir Steinbjørn Jacobsen.

### Pápi - sonur tín...

Onkur hevur argandi tikið til, at borgarstjórin hevur verið so samstarvshugaður við KÍ, tí hetta kann skapa rúm fyri at fáa sonin - t.e. Rógvi Jacobsen, landsliðsspælari - aftur til KÍ. Men tá vit at enda seta hendan spurningin, hevur borgarstjórin bestan hug at smílast.

- Tað er sjálvandi einki at ivast í, at eg fegin síggi Rógva aftur í KÍ, eins og vónandi fleiri aðrir klaksvíkingar gera tað. Men í løtuni er hann so bundin at einum sáttmála í Íslandi, og eg gangi bara út frá, at tann støðan ikki er broytt. Og sum so er tað ongantíð betri, enn um hann á yrkisleið sínari meddar enn hægri enn tað, at koma aftur til Klaksvík at spæla fótbólt, heldur borgarstjórin at enda.



*Steinbjørn Jacobsen heldur, at júst hendan loysnin ger tað møguligt hjá kommununi eisini at hava pening tøkan til onnur ítróttarendamál enn júst KÍ*

*Mynd: Norðlýsið*

# Visión 2009

**Meðan Føroyar skulu verða heimsins besta land um 10 ár, so hevur KÍ enn meira ítøkilig mál. Har ætla tey sær nevnliga at hava Føroya besta felag um 4 ár**

KÍ
*Jákup Mørk*



Besta felag í Føroyum í 2009. Somikið greiður er málsetningurin, sum KÍ nú hevur sett sær fyri at røkka. Og tað var hornasteinurin undan hesum, sum varð almannakunngjørdur á tíðindafundi í KÍ-caféini týskvøldið.

### Fíggjarliga grundarlagið

Fremsta orsøkin til tíðindafundin tóktist vera fráboðanin um, at KÍ nú er komið ásamt við ognarar og lánveitarar um ein leist, sum skal tryggja fíggjarliga grundarlagið undir felagnum framyvir. Tann loysnin er umrødd aðra staðni á hesum síðum.

Undir heitinum »besta felag í 2009« býr ein ætlan, sum inniber nógv meira enn besta mansliðið hjá KÍ. Millum annað Stjørnan, kvinnufótbóltur og ungdómsdeildir, so var tað fyri tað mesta KÍ og framtíðin í Formula-deildini, sum stóð á skránni. Í øllum førum tá sæð verður burtur frá loysnini á skuldarspurninginum.

Framyvir verður tað so, at raksturin av besta mansliðnum hjá KÍ verður lagdur í eitt partafelag fyri seg. Økonomiski garanturin aftan fyri hetta felagið

# Sjálvsálitið er í lagi

**Eg prógvaði tað í ’99, og eg eri sannførdur um, at eg enn einaferð skal prógva, at eg eri besti venjarin í Føroyum, segði Tony Paris millum annað, tá hann segði seg vera til reiðar at taka við leiðsluni av KÍ-skútuni aftur**

KÍ-VENJARIN
*Jákup Mørk*

Tony Paris stendur høgt í metum í Klaksvík. Skuldi nakar ivast, so var hesin ivin burtur, tá bretin undir buldrandi klappsalvum varð móttikin sum hálvur frelsari, tá navn varð sett á komandi høvuðsvenjaran. Ein høvuðsvenjari, sum er kanska týdningarmiklasti liðurin í at røkka málinum um, at KÍ í 2009 skal vera besta felagið í landinum.

### Straight to business

Og sjálvur tykist Paris heldur ikki at vera bangin fyri stóru vónunum, sum eru tengdar at honum.

- Áðrenn eg sigi nakað, so lati eg meg úr jakkanum. Hetta er eitt tekin um, at menn fara til arbeiðis. »And business starts right now«

Byrjunarsetningurin kundi neyvan verið greiðari og meira málsøkin, og í stuttu røðu sínari legði venjarin eisini dent á, at hann ikki vil lata sín part liggja eftir.

- Eg havi fylgt væl við, hvussu KÍ hevur staðið seg seinnu árini. Og tað hevur ikki altíð verið eins hugaligt. Tað vóru eisini fólk, sum hildu meg vera svakan, tá eg fór at umhugsa tilboðið. Tey søgdu mær, hvussu gott starv eg hevði. Hvussu høgt eg stóð í metum í Klaksvík, og at alt annað, sum var verri enn 1999 fór at minka um hetta umdømi.

- Tað kann eisini vera, at tey hava rætt, men eitt umdømi í sjálvum sær gevur jú einki. Avbjóðingin við at koma til Klaksvík aftur og royna at endurtaka sigrarnr, var ov stór, til at eg kundi siga nei. Hetta er veruliga nakað, sum eg ynski at gera. Og móttøkan, sum eg havi fingið í Klaksvík, nú eg havi vitjað aftur, hevur sannført meg seinasta pettið.

### Vil enda ordiliga

Og so avdúkaði bretin eisini, at tað hóast alt eisini liggja nakrar kenslur aftan fyri, nú hann enn einaferð kemur til KÍ.

- Hesa ferð verður arbeiðið øðrvísi. Í 1999 var tað nærum, sum ein hernaðaratsókn. Eg kom til felagið. Eg gjørdi mítt arbeiði, og fór so víðari. Longu mánadagin eftir, at greipan var fingin til høldar, var eg burtur aftur. Og tað kundi eg ynskt mær øðrvísi.

- Hesaferð verður setningurin størri í so máta. Eg skal í størri mun vera við til at skapa karmarnar. Hugsa um undirstøðiskervið í sjálvum felagnum. Og ikki minst eisini taka lut í menningini av ungdómsarbeiðnum. Tað er jú sjálvt grundarlagið undir einum og hvørjum felag, helt Paris, sum tó ikki er í iva um, at hetta er ein avbjóðing, sum hann er førur fyri at lyfta.

- Tað fer at krevja knallhart arbeiði, og tað er ikki víst, at úrslitini koma alt fyri eitt. Men eg eri púra vísur í, at tað fer at eydnast. Eg vísti í 1999, at eg var besti venjarin í landinum tað árið. Og eg ætli mær